

**Tórhallur Andreassen:**

# "Bíða við at doyggja til vit hava lagt at!"

**Nú eru vit komin til seinasta part av frásøgnini hjá og um Tórhall, hansara ætt og hansara bygd, Norðskála. Her hevur verið farið víða um, men hetta er fyrst og fremst ein fiskimannasøga, sum nógv hava fegnast um. Men dramatikkur var, tá ið Thorshavn skuldi leggja at í Svínoy, og Tórhallur mátti biðja ein av manningini um at bíða við at doyggja**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**10. partur**

## Hjalgrim var ein rokari

Vit hava umrøtt hinar beiggjarnar, og nú er bert Hjalgrim eftir. Hann var fjórði elstur av systkjunum og næstelsti beiggin. Hann fór eins og hinir ungur til skips. Hann var millum annað við Steady, sum var eitt skip við donskum reiðara. Teir veiddu í Grønlandi við bátum.

Hjalgrim var nótaformaður heima hjá okkum. Hann var ein koyrari, og hann dugdi eisini snildir. Í støðum í Sundalagnum var ringur botnur, og tá lá illa fyri at kasta nót. Men ráð vóru fyri tí. Tá ið Hjallgrim sá eina torvu av seiði á slíkum botni, fekk hann sær eina hvíta fjøl og fortoyaði hana niðri á botn fyri at fáa seiðin at flyta seg norður á bleytari botn. Hetta riggaði væl og einaferð fingu vit í einum slíkum føri fýra bátar av seiði.



*Hjallgrim, beiggi Tórhall, var ein knassi*

Seiður var góður matur. Vit saltaðu hann í kaggar og hongdu upp at turka. Einki varð selt, men ofta varð givið.

Hjallgrim var motorpassari í fleiri ár og róði nógv út. Hann búsettist í Klaksvík. Kona hansara var Turid f. Samuelsen. Sigmund hjá Hjalgrim greiðir frá, at tey vóru 10 systkin, har av fimm beiggjar. Teir endaðu allir á sjónum. Teir vóru mangan túrin við pápanum í báti. Tá ið hann kom meira upp í árini, vóru tað synirnir hjá systrini Ågot, sum vóru við abbanum á floti. Tað eru teir, sum eiga línubátin Ågot, og tað liggur eisini væl fyri hjá teimum.

Hjalgrim var góður at læra frá sær, tá ið tað var um sjógvin og góðan sjómannskap at gera.

Tórur Andreassen er ein sonur Hjalgrim. Hann er eisini royndur fiskimaður. Hann dugir eisini at skriva og taka vit nakað við, sum hann hevur skrivað í FF-blaðnum um túrar saman við pápa sínum. Hesar frásagnir lýsa væl hetta umhvørvi, sum hevur verið eyðkenni fyri teir allar.

## Ein buldrasligur túrur

Pápi hevði bygt sær ein lítlan bát. Hann var umleið tríggjar metur langur, flatbotnaður og spískur í báðum endum. Báturin var hentur á víkini og gav mangan feskan bita. Eitt skifti hingu umleið 700 greipur undir vegginum og undir brúnni um Gravará. Góður terri var undir brúnni, tí har var altíð trekkur av ánni.

Einaferð hevði pápi sett fýra gørn út fyri Túgvusteini, sum er innanvert Norðoyri, skamt frá bøgarðinum. Bátin hevði pápi drigið upp innanfyri lendingina á Oyri, soleiðis at tað bleiv styttri at rógva, tá ið gørnini skuldu dragast aftur. Eg var fimm ára gamal og hevði verið mangan túrin á floti við pápa.

Eg varð vaktur mitt á nátt at koma við at bjarga gørnunum. Vit gingu út til Oyrar og høvdu vindin í andlitið á veg út. Tað var ikki so nógvur vindur, men tá vit koma oman á lendingina sást, at óró var í sjónum. Pápi fór við bátinum, meðan eg var eftir. Tað gekk væl at koma frá landi, og tað vardi ikki leingi til hann var aftur. Men útvið ein tíma hevur tað óivað tikið. Hann hevði drigið tvey av gørnunum. Tey blivu tikin uppá land. Ikki var nógv í. Pápi fór síðan avstað aftur, men tá líkasum øtlaði hann veðrið. Eg gekk har og mól aftur og fram eftir bakkanum. Inn móti Álvheyggi, sum er nakað inn frá lendingini, og út aftur. Myrkt var og vánaligt sýni, so eg sá einki. Tað dró út, og eg gjørdist bangin um pápa.

Men so sá eg pápa koma inn móti landi. Nú var sjógvurin nógv versnaður, so ikki var lætt at lenda sum umstøðurnar nú vóru. Í tí pápi kemur inn móti lendingini kastar hann mær fanglínuna. Eg taki hana, og í sama bili kemur ein fylling. Hon lyftir bátin stevnirætt við pápa og gørnum upp um kantin og langt inn á lendingina. Eg renni undan, meðan eg togi í línuna. Pápi loypur úr bátinum og báðir halda eftir, meðan tað fjarðar út aftur. Soleiðis kom báturin langt uppá turt í hesi fylling, sum var tann einasta, sum náddi yvir kantin á lendingini, meðan vit vóru har. Ikki bleiv tosað um tað. Men eg trúgvi, at Harrin rætti eina hjálpandi hond hesa myrku nátt á



*Tórur hjá Hjallgrim myndaprýddi ársfrágreiðingina hjá fiskimannafelagnum í 2003. Her er ein av hansara tekningum, sum kundu verið mynd til hansara frásagnir í hesi grein*



*Andreas og Tóta saman við børnunum Elinborg og Sigtór*